*Framhald av síðu 3*



*Birgir Kruse, formaður á Listastevnuni 2002, avmyndaður við Helgu Hjørvar, stjóra í Norðurlandahúsinum og samskiparanum Oddvá Nattestad*

*Mynd: Finnur Justinussen*

### Eisini børn

Áhugin fyri Listastevnuni yvirhøvur vísir seg at vera sera stórur. Í fjør varð selt fyri 600.000 krónum í atgongumerkjum, og vóna fyrireikararnir, at listastevnan verður eins væl vitjað og í fjør.

Stevnan er ikki bara fyri vaksin fólk. Nei, eisini er skipað fyri filmsframsýningum fyri børn. Harav kann nevnast ein frumframsýning av einum Disney teknifilmi og einum nýggjum Steven Spielberg teknifilmi.

Teitur Árnason hevur ein nýggjan »Burturhug« kláran til Listastevnuna. Hann eitur Burturhugur – Obcervaciones de Cuba. Ein filmur, sum er gjørdur eftir sama leisti, sum tann fyrri.

Umframt film og tónleik, verður eisini sjónleikur á skránni.

Eitur nakað land Weekend?, MacBeth og aðrir sjónleikir, bæði føroyskir og útlendskir sjónleikir verða sýndir.

### Næstan Björk

At fáa stápla eitt slíkt stórt tiltak uppá beinini er ikki bara sum at siga tað.

– Tað eru bara 10%, sum enda yvir vatnflatuni, tá tað kemur til stykkis. Millum annað kunnu vit nevna, at vit hava havt samskifti við íslendsku songkvinnuna Björk, sum ógvuliga gjarna vildi koma til Føroya. Ætlanin varð at gera eina rundferð, har Björk fór til Nuuk, Reykjavík, Tórshavn og Bergen, men allar konsertirnar vórðu avlýstar, tí tað vísir seg, at hon er við barn. Björk fer bert at hava eina konsert í ár, og hon verður á Venice Beach í Kalifornia. Men tað góða við hesum er so, at vit hava so hesar kontaktirnar opnar til eina aðru ferð, sigur Birgir Kruse.

Ein annar kendur maður kemur til Føroya, og eitur hann Ole Bornedal. Hann er leikstjórin aftanfyri stórfilmin, Jeg er Dina, sum í hesum døgum gongur í Havnar Bio. Hesin filmur verður vístur aftur tá stevnan verður, og fer Ole Bornedal at halda fyrilestur um tað at gera film.

Sum eitt annað kuriosum kann nevnast, at tólv føroyskir gittarleikarar fara at hava konsert bæði í Runavík og í Havn. Hesar konsertir vera saman við einasta føroyska gittarbyggjaranum, Petur Magnus Bjarnastein. Á hesum konsertum verður ein ektaður, hondgjørdur Bjarnastein gittari burturlutaður.

Listastevnan verður ikki bara í Havn. Hon verður spjadd kring landið, men tað er avmarkað, hvussu nógv kann vera úti á bygd.

– Tá tiltøk verða fyriskipað má grundarlag vera fyri at fáa tiltakið sjálvt at bera seg. Tað vil siga, at tað ber illa til at hava eitt tiltak á einum plássi har fá fólk koma, tí so verður prísurin av atgongumerkjum so himmalhøgur. Tí hava vit valt at leggja tey størstu tiltøkini á stórplássunum, soleiðis at tey eisini kunnu bera seg fíggjarliga, greiðir Birgir Kruse frá.

Listastevnan er í ár longd við fýra døgum. Í fjør var hon 12 dagar, meðan hon í ár verður 16 dagar. Fyrireikararnir vóna sjálvandi, at væl verður vitjað.

– Vit hava koyrt konstant á maksimum, helst overdrive, heldur Birgir Kruse skemtiliga fyri. – Tí er tað eitt stórt trýst á okkum fyrireikarum, men vit hava roynt at gera hana so fjøltáttaða sum til ber.

Listastevnan 2002 verður í døgunum 3. – 18. august 2002.


**Byggifrøðingur**

**Starv í Føroya Banka**

**Avbjóðandi starv sum byggifrøðingur í Føroya Banka**

Eitt spennandi og avbjóðandi starv í fyrisitingardeildini í Føroya Banka er hervið leyst at søkja.

Fyrisitingardeildin varðar av bygningum bankans og fevnir hetta um umsiting og viðlíkahald av 24 deildum kring um Føroyar.

Føroya Banki hevur seinastu árini havt stóran búskaparligan vøkstur og merkist hetta aftur í øktum virksemi og einum alsamt vaksandi kravi um áhaldandi menning og viðlíkahald av deildum bankans.

**Starvið**

Dagliga starvið fevnir um:

- at umsita og hava umsjón við deildum bankans,
- at standa fyri og samskipa arbeiði við størri ábøtum og/ella nýbygging,
- at hava um hendi samskifti við ráðgevar og arbeiðstakarar,
- at verða við í gerð av ætlanum fyri framhaldandi menning av deildum bankans og gerð av fíggjarætlanum hesum viðvíkjandi,
- luttøku í tvørgangandi arbeiðsbólkum, við atliti til nýinnrætting o.a.
- aðrar ad-hoc uppgávur, ið javnan stinga seg upp í einum livandi umhvørvi.

**Førleiki**

Søkt verður eftir byggifrøðingi ella fólki við aðrari viðkomandi útbúgving og skal tann, ið verður settur hava góð samstarvsevnir og samstundis kunna arbeiða sjálvstøðugt.

Tað er ein fyrimunur, um viðkomandi hevur útbúgving sum handverkari, men er hetta eingin treyt.

Vit rokna við, at viðkomandi hevur royndir innan nevndu arbeiðsøkir og evnar at fyriskipa og hava um hendi stýring av størri verkætlanum.

Er tú áhugaður kunnu vit bjóða eitt spennandi starv, ið er fakliga og persónliga mennandi, við góðum arbeiðsumstøðum.

**Treytir**

Setanartreytir verða avtalaðar eftir royndum og førleika hjá umsøkjara.

**Umsókn**

Hevur tú áhuga at royna nýggjar avbjóðingar, ert tú vælkomin at søkja starvið við at senda umsókn saman við viðkomandi skjølum til:

P/F Føroya Banki
Starvsfólkadeildin
Postboks 3048
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 24. juni 2002.

Meir fæst at vita um starvið við at venda sær til Inga Vestergaard ella Bjarka Mohr, starvsfólkaleiðara, á tlf. 311350.

FØROYA BANKI




# Ternan avloysir Smyril á Norðoyastevnu

**Nú Smyril er í dokk, hevur Strandferðslan sett Ternuna at sigla túrin úr Havn til Klaksvíkar. Hetta er túrurin, sum teir flestu róðarbátarnir og róðrarfólkið plaga at koma við**

STRANDFERÐSLAN
*Solby A. Eliasen*



*Ternan skal føra róðrarfólk og bátar úr Havnini til Klaksvíkar á Norðoyastevnu í ár*

**Klaksvík:** Ternan fer úr Havnini klokkan níggju leygarmorgunin til Klaksvíkar og suður aftur klokkan sjey um kvøldið. Sosialurin fættir frá Strandfaraskipum Landsins, at róðrarbátar og róðrarfólk hava framíhjárætt til hesar túrarnar. Túrurin úr Havnin til Klaksvíkar fer at taka umleið ein tíma og trý korter, og Ternan fer at leggja at við vestaru bryggju, har sum Smyril plagar at liggja. Eisini er ferðasamband til og frá Suðuroynni við Scaniu, sum fer av Drelnesi klokkan seks leygarmorgunin. Hesar broytingarnar eru allar at finna inni á heimasíðuni hjá Strandferðsluni, sum er www.ssl.fo.

Hetta fer alt helst at ganga fínt norður til Klaksvíkar, men onkur rógvari, sum Sosialurin hevur tosað við, sigur seg stúra fyri túrinum suður aftur um kvøldið. Her verður hugsað um, at sjálvt um róðrarfólk og bátar hava framíhjárætt, so er tað ein sannroynd, at tað eru ofta nógv fleiri fólk við á túrinum suður enn norður. Tað kemst av, at alt fólkið er savnað á vestaru bryggju til steypahandanina eftir kappróðurin. Og so hevur tað verið so líka til at fara beinleiðis umborð á Smyril, sum so hevur ført tey øll aftur til Havnar. Men tað kann fara at verða ein trupulleiki í ár, tí Ternan tekur so nógv færri ferðafólk enn Smyril.

Ternan er tó ikki einasti møguleikin at sleppa úr aftur Klaksvík. Dúgvan siglir sjálvandi eisini eftir kappróðurin, og seint út á kvøldið. Seinasti túrurin av Klaksvík Norðoyastevnuaftan er klokkan 01.00.

# Myndaframsýning á Norðoya Forminnisavni

**Aftur í ár skipar Norðoya Forminnasavn fyri eini framsýning á Norðoyastevnu. Talan er hesuferð um eldri myndir úr Norðoyggjum og Eysturoynni, sum danin Johannes Klein tók fyri næstseinasta aldarskifti, umframt at yngri myndir eisini verða at síggja**

FRAMSÝNING
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Framsýningin hjá Norðoya Forminnasavni er vorðið eitt afturvendandi tiltak á Norðoyastevnu, og verður árið í ár einki undantak í so máta.

Talan er hesuferð um eina forvitnisliga myndaframsýning við myndum úr Norðoyggjum og Eysturoynni, sum danin Johannes Klein tók fyri næstseinasta aldarskifti, tá hann saman við Daniel Bruun ferðaðist her í Føroyum.

Johannes Klein var málari og arkitektur, og hevur í bókini »Fra de Færøske bygder«, sum Daniel Bruun gav út í 1929, tekna fleiri tekningar av húsum, úthúsum og øðrum føroyskum bygningsverkum.

Umframt at tekna tók hann eisini fleiri myndir, og eru tær myndirnar millum tær bestu, sum lýsa føroyska gerandisdagin beint undan næstseinasta aldarskifti.

Føroya Forminnissavn hevur fingið gjørt fleiri av myndum hansara í stórari støðd, og eru myndir úr Norðoyggjum og Eysturoynni við á framsýningini hjá Norðoya Forminnasavni, myndir tiknar á Viðareiði, á Skarði, í Haraldssuni og á Oyri.

Á framsýningini verða eisini fleiri aðrar yngri myndur úr Norðoyggjum at síggja. Myndir, sum ikki hava verið so nógv frammi áður.

Framsýningin verður í framsýningarhølinum í neðra, og verður hon opin norðoyastevnuaftan og norðoyastevnudag frá klokkan 17 til klokkan 21, umframt eisini mánadagin frá klokkan 19 til klokkan 21.

Altjóða Tubbaksfríur dagur í Klaksvík:

# Klaksvíkar býur – Roykfríur

**Hetta var bert eitt av teim mongu slagorðunum, sum roykibólkurin hjá báðum fólkaskúlunum í Klaksvík hevur fingið sendandi inn í sambandi við Altjóða Tubbaksfría dagin, sum eisini varð hildin í Klaksvík**

ROYKING
*Ragnhild Ellingsgaard*



*Børnunum dámdu væl týska gandakallin Jolly, sum var komin til Klaksvíkar á vitjan*

**Klaksvík:** Skúlarnir báðir høvdu lagt stórt fyri, tá Altjóða Tubbaksfríi dagurin hósdagin varð hildin í Klaksvík.

Allir næmingarnir á báðum skúlunum vóru býttur sundur í tveir bólkar, har tann eldri helt til í aulini í Skúlanum við Ósánna, meðan teir yngru næmingarnir vóru savnaðir saman í fimleikarhøllini í Skúlanum á Ziskatrøð.

Á skránni vóru ymisk tiltøk, sum skulu verða við til at fáa boðskapin um vandamikla royking út til ungdómin.

### Gandakallur úr Týsklandi

Tiltøkini fevndu um tónleik, fyrilestur, sjónband og ymiskt annað. Men tað, sum børnini uttan iva hildu vera stuttligast, var gandakallurin, sum var komin allan vegin úr Týsklandi til Klaksvíkar at halda Tubbaksfrían dag.

Føroya Bjór hevði boðið gandakallinum hendan vegin, og hevði hesin gandakallur eisini fingið nýtt navn, nú hann vitjaði Klaksvík. Navn hansara var nevniliga Jolly, og hetta hildu børnini vera óføra stuttligt.

Gandakalllurin hevði nógv at vísa børnunum. Hann átti eina rúgvu av ballónum, sum hann síðan gjørdi til ymsar figurar og gav børnunum. Og børnini vóru púra vill eftir at sleppa at eiga okkurt av øllum hesum, sum gandakallurin dugdi at gera.

Men ballónurnar vóru ikki tað einasta, ið gandakallurin dugdi at spæla við. Einaferð bað hann tí eini lærarinnuna komu upp á pallin saman við sær. Hon skuldi leggja seg á ein bonk, og síðan tók gandakallurin bonkin undan henni. Men lærarinnan datt ikki á gólv – nei, hon var hangandi í berari luft, til gandakallurin hjálpti henni aftur á føtur.

Hetta dámdu børnunum væl, og rópini frá teimum hoyrdist um allar geilar.

Umframt gandakallin Jolly var eisini tónleikur við Karl Martin Samuelsen á skránni, og dugdi hann bara væl at fáa børnini við.



*Virðislønir fyri besta slagorð vóru eisini handaðar, og fingu hesar gentur hvør sítt gávukort frá borgarstjóranum*

### Roykfríir skúlar

Tiltakið hósdagin var bert ein partur av eini langtíðarætlan, sum Heilsunevndin í Klaksvíkar Býráð saman við báðum fólkaskúlunum, er farin í holt við.

Endamálið við hesi verkætlan er at gera báðar skúlarnar roykfríar, áðrenn alt ov long tíð er farin.

Ein arbeiðsbólkur varð í hesum sambandi settur, og fekk hann til uppgávu at skipa fyri ymsum tiltøkum í sambandi við tí fyribyrgjandi arbeiðnum, sum gjørt verður.

Bólkurin er mannaður av tveimum umboðum fyri lærarnar í báðum skúlunum, og eisini formanninum í Heilsunevndini hjá Klaksvíkar Býráð.

Í sambandi við Atjóða Tubbaksfría dagin skipaði hesin arbeiðsbólkur eisni fyri eini teknikapping og eini slagorðskapping, og vinnararnir av hesum kappingum fingu so virðislønir teirra handaðar hósdagin.

Sjálvur borgarstjórin, Steinbjørn Jacobsen, handaði næmingunum virðislønir teirra, sum vóru eitt gávukort frá fløguhandlinum Leikalund í Klaksvík.



*Karl Martin Samuelsen undirhelt, saman við formanninum í Heilsunevndini, Rana Nolsøe, børnunum við tónleiki*